# til Evropa





*Atonement er ein filmatisering av kendu skaldsøguni hjá Ian McEwan*



*Filmurin Juno vann Oscar*

fyrigeva sær sjálvum. Eingin ivi um, at skaldsøgan er eitt megnar realistisk listaverk, men filmurin er bert góður í støðum, so tær nógvu instillingarnar til Atonement vóru fyri tað mesta spiltar.

## Besta kvinnan

Tað vóru eisini nógv, sum antin ikki vunnu, ella yvirhøvur ikki vóru instillaði. Cate Blanchett vann t.d. ikki eina virðisløn fyri filmin Elizabeth: The Golden Age, sum nógv høvdu vanta. Her gjørdist vinnarin, heldur ókenda, Marion Cotillard (Big Fish, A Good Year) fyri leiklutin sum Edith Piaf í filminum La Vie En Rose, ið er ein hugtakandi og ævisøguligur franskur filmur um lívið hjá mest elskaðu og tragisku fronsku sangarinnuni nakrantíð. Blanchett kom heldur ikki at vinna ein Oscar fyri besta kvinnuliga hjáleiklutin í filminum: I´m Not There, um mytiska lívið hjá Bob Dylan, har hon spælir hin ungi Bob. Í ár var tað hin heldur ókenda og tó hugtakandi Tilda Swinton, ið vann fyri filmin Michael Clayton. Swinton er kend fyri leiklutir sum Orlando, Narnia og ikki minst fyri óføra góða og rørandi indie-filmin Tumbsucker frá 2005, ið eisini hevði Keanu Reeves við sum ein super løgnan tannlækna. Tumbsucker vann eina Silvurbjørn Virðisløn í Berlin í 2005 og er ein ótrúliga góður filmur.

Blanchett hevur tó fyrr vunnið ein Oscar fyri filmin "The Aviator" frá 2004. Sambært heimasíðuni IMBD hevur hon ikki vunnið færri enn 54 virðislønir. Tað harmaði meg tó, at hon ikki kundi fáa hesa fyri I´m Not There, men hinvegin var kappingin sera hørð. Stóð tað til mín, so fekk Marion Cotillard ikki stóru virðislønina, men hon skuldi verið farin til sjarmerandi og deiliga lívsjáttandi høvuðsleikarin í filminum Juno, sum eitur Ellen Page, er ein óvanligt talent, ið vit koma at síggja aftur. Hon spælir 16 ára og gamalklóka gentan Juno, ið gerðst við barn. Hon vil ikki fremja eina fosturtøku og endar við at ættleiða barnið til eitt ungt par. Hetta er ein ótrúliga fittur filmur við eini naivari søgu, men filmurin er fullur av góðum tónleiki, og hann hevur veruliga eitt vakurt "feel-good" hjartað. At tað er Jason Reitman (Thank You For Smoking), ið hevur leikstjórnað hann, er heldur løgið. Juno fekk tó eina virðisløn fyri besta originala leikritið, og hendan virðislønin fór til sera alternativa høvundan Diablo Cody, ið møtti upp til Oscar við einari stórari tattoering á arminum.

## Øll Hini

Tim Burtonsa filmur Sweeney Todd við Johnny Depp, gjørdist ikki nakar stórur vinnari. Hann var instillaður tríggjar ferð, men vann bert fyri art-direction.

Filmurin Det gyldne Kompas vann fyri bestu visuellu effektir.

Aftaná eina Oscarnátt fari eg altíð at hugsa um øll hini genialu filmfólkini í USA og kring heimin, ið hvørki í 2007/2008 ella nakrantíð hava fingið ein kjans innan Oscargáttina. Fólk sum Jim Jarmusch, Todd Solondz, Wim Wenders, Wes Anderson, Michel Gondry, og hvar eru filmar sum 300?

Í ár var tó eitt av teimum frægastu árunum, har vit enn einaferð sóu tey frá Evropa fara við nærum øllum virðislønunum.